KUNNGERÐ

Um framløgu av byggisamtykt fyri Oyndarfjarðar kommunu

Sambært grein 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at byggisamtykt fyri Oyndarfjarðar kommunu 2000-2001 verður løgd fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í Oyndarfirði frá 21. august 2000 til og við 08. september 2000. Tó skal verða gjørt vart við, at skrivstovan bert er opin mánadagar millum kl. 17.00 og 19.00, men kunnu áhugað um neyðugt seta seg í samband við bygdaráðið fyri at fáa atgongd til málið aðrar tíðir.

Møgulig mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot til hetta, ið skulu vera skrivlig, skulu vera Oyndarfjarðar bygdaráð í hendi í seinasta lagi **20. november 2000 kl. 16.00**.

Oyndarfjørður, tann 14. august 2000

Oyndarfjarðar bygdaráð

www.sosialurin.fo

Tvingsilssøla

Hósdagin tann 14.09. 2000, kl. 09.15 verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 561, Froðba**.

Ognin er eini sethús 120 m² til støddar í kjallara og stovuhædd. Húsini eru gjørd úr timbri á betonggrund og takt við tjørupappi. Grundøkið er 1579 m² til støddar.

Húsini eru soleiðis innrættað:

Í kjallaranum er gongd, verkstaður, handil, wc, kontór, kjallararúm og fýrrúm. Í stovuhæddini er gongd, køkur, bryggers, stova, 2 kømur, baðiverilsi og soviverilsi við baðiverilsi. Húsini eru bygd í 1989 og eru í góðum standi. Grótgarður er gjørdur niðanfyri húsini.

Sølan er umbiðin av **Fríðu Paturssun, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20000346)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Skeið í innaneftirliti

Skipað verður fyri skeiði í innaneftirliti. Skeiðið er í trimum eindum. Til ber at melda seg til eina, tvær ella allar tríggjar eindirnar. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjari eind.

Eind 1:	**Heilsufrøðilig viðurskifti**	**18., 19. og 20. september 2000**
Eind 2:	**HACCP**	**2., 3. og 4. oktober 2000**
Eind 3:	**Íverksetan og viðlíkahald av innaneftirlitinum**	**16., 17. og 18. oktober 2000**

Málbólkur: Stjórar, góðskuleiðarar og starvsfólk, ið saman við góðskuleiðaranum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø.

Undirvísarar: Serfrøðingar í innaneftirliti

Stað: Hotel Føroyar í Havn, allar dagar kl. 9.00 - 16.00

Skeiðskostnaður: Kr. 3.500 fyri hvørja eind (verður kravt inn undan skeiðinum)

Prótvøka: Skipað verður fyri prótvøku í øllum trimum eindunum eftir lokið skeið

Frálæran fevnir m.a. um:

Smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvið, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.

Freistin at boða frá luttøku er **8. september 2000.** Tilmelding fer fram við at senda ella faxa innskrivingarseðilin til Hotel Føroyar, við Oyggjarvegin, 100 Tórshavn. Telefax nummarið er 316019. Til ber eisini at ringja til Hotel Føroyar tlf. 317500 og boða frá luttøku. **Tilmeldingin er bindandi**. Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73 • Fax. 42 44 28

Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti

Eind 1: __ Set kross **Eind 2:** __ Set kross **Eind 3:** __ Set kross

Eftirnavn:	Føðingardagur:
Fornavn:	Starv/Arbeiðspláss:
Gøta:	Tlf. arbeiði:
Postnr./stað:	Tlf. heima:
Teldupostur:	Gjaldari:

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari

BERGUR Á REYNATRØÐ

Børkuvegur, 620 Runavík

Tlf. 448480

Stongt vegna summarferiu til 21. aug.

Almenn móttøka

í sambandi við at

Hildibjart Johansen,

stjóri á Lønjavningarstovuni,
hevur havt 40 ára starvsdag
verður móttøka í Fiskimálastýrinum,

hósdagin 24. august 2000
millum kl. 14.00-16.00.

Øll eru vælkomin.

Fiskimálastýrið

Lesarabræv

FSF og børnini

Tað var við stórum spenningi, at børn, ung og gomul fóru í Gundadal at síggja fótbóltsdystin millum Føroyar og Danmark.

Í fleiri dagar høvdu børnini glett seg til hetta at síggja føroyingar spæla fótbólt, har idolini Todi Jónsson, Jákup Mikkelsen, Peter Schmeichel, Micael Laurup og onnur kend nøvn vóru frammarlaga í práti og tosi, sum er so livandi eyðkent hjá børnum.

Áhugin vísti seg eisini at vera ovurstórur fyri at keypa atgongumerkir í góðari tíð fleiri dagar, áðrenn dysturin skuldi spælast, og Fótbóltssamband Føroya kunngjørdi, at billettir, sum enn vóru óseldar, kundu fáast í Gundadali undan dystinum (kl. 18.45) fyri 170 kr. og 50 kr. til ávikavist vaksin og børn. Kl. 15 var long kø í Gundadali fyri at keypa billettir, og sum vituligt er nógv børn.

Billettsølan var illa nokk byrjað, tá børnini fingu at vita, at ongar barnabillettir vóru eftir, og at tey, børnini, tessvegna skuldu gjalda 170 kr. fyri at sleppa inn.

Tað er ikki trupult at ímynda sær ta eyðmýking, hesi neyðars børn við 50 krónum í hondini hava verið fyri, men tað er trupult hjá foreldrum og ommum og abbum at skilja, hvussu Fótbóltssamband Føroya, sum átti at staðið sum eksponentur fyri hugtakinum »sunn sál í sunnum likami«, kann fremja slíkan ágang móti barnasálini.

Hevði orsøkin til hesa hending verið tann, at øll áskoðaraplássini vóru útseld, og at tað tíverri ikki lat seg gera at selja fleiri billettir til børn og vaksin, so høvdu óivað mong verið kedd, men ongin eyðmýking av børnum.

Um hetta fer at skapa præcedens, so kunnu vit ímynda okkum, at t.d. Atlantic Airways ella Smyril Line í hægstu seson, tað vil siga, tá ið ferðahugur føroyinga er í hæddini, fara at kunngera um diskin ella í telefonini, at børn undir 11 ár mugu rinda vaksnamannabillett, tí barnabillettirnar eru uppi, og einans vaksnamannabillettir eru við hondina.

Skal Fótbóltssamband Føroya bjarga sínum trúvirði, sum í løtu kann liggja í einari fliðuskel, so er bert eitt at gera: endurrindið tær 120 krónurnar, sum órættvíst fyri ikki at siga óregluliga eru tiknar frá børnum (foreldrum og ommum og abbum) uppi í Gundadali tann 16. august 2000.

Heri Mohr

Góði Barsskor

Tað var gott, at tú gjørdist frískur aftur. Tað er jú ikki so óvanligt at skranta á gamalsaldrinum, føddur sum tú ert í 1929. Maskinan steðgaði upp, og tú fór at reka púrasta hjálparleysur, heldigvís var veðrið av tí fínasta, so har hendi ongin ólukka. Men at tú skuldi »styðjast« til kei teir tveir næstu túrarnar aftan á sjúkraleguna, haldi eg vera ræðandi. Sera óhugnaligt, nú veturin nærkast, og tú ongan avloysara fært.

Tað var ikki so gott við hinum stóra skaðanum, tú fekst fyri nøkrum árum síðani, tá tú rendi á land. Tá fekst tú eitt hol so stórt, at tú mátti mátti hava jarn í. Síðani hevur tú ikki kunnað rættað teg upp, men hellir til ta einu síðuna. Ja, tú ert skeivur, men tað sæst næstan ikki. Vit eru bara nøkur fá, sum vita tað. Havi eisini hoyrt, at tú lekur so illa. Ná, pumpan er vælsaktans góð nokk.

Eg trúði, at tú slapp at leggja teg hesa ferðina, men nei, út at sjabba hvønn evigeinasta dag, tú fært onga hvíld. Enntá eykatúrar, tí tú hevur ikki pláss fyri øllum í senn, sum skulu yvir á Kalsoynna. Tað hevði verið deiligt hja tær bert at siglt stuttleikatúrar um summarið og í góðum veðri, tá kundi tú siglt framvið landi, og um tú fekst hug at leggja teg, so kundu fólk svomið í land.

Tað er ergriligt, at skip ikki fáa børn, tí so kundi Barsskor Yngri tikið yvir, áðrenn tú vart heilt affeldigur. So hevði tú sloppið at byrja »tín triðja aldur« sum stuttleikaskip og sum museum. Óndar tungur vilja vera við, at tú bert hongur saman við málingini, men tað trúgvi eg onki uppá. Tú ert jú stadigvekk eitt deiligt skip, tað vita vit, og nógv eru tey, ið minnast teg við kærleika og vælvild.

Góði Barsskor, eg fari at biðja eg um, tá tú ikki orkar meira og legst fyri allarsíðstu ferð, at tú legst við eina kei, eftir at alt fólkið er farið í land. Góði, ikki leggja teg á havsins botn mitt í Kalsoyarfirði mitt um veturin fullur av skúlabørnum, neytum ella øðrum.

Gævi, at motorurin ikki steðgar upp, beint tá tú skalt leggja at, tað hevði ikki verið lukkuligt. Bara eg ikki eri við, um tað fer at henda.

Kærar heilsanir,

Jonna Justinussen

Røtt avgerð, Torbjørn Jacobsen!

Tá ið tíðindini bórust, at tú hevði avgjørt, at Heilsuskúlin skuldi liggja á Tvøroyri, mátti mangur suðuroyingur undrast og frøast og hugsa at undranna tíð kanska ikki er av enn.

Røtt avgerð krevur rættan mann, og ogur vóna, at tú tolir tað trýst, sum man fara at koma. Smá hvin og níst dugir tú væl at taka, kenni eg teg rætt.

Sjálandi skal skúlin liggja á Tvøroyri og onga aðrastaðni, tí enn hoyrir so Suðuroyggin til hin partin av Føroyum.

Kom mær til hugs, ofta hevur verið tikið til orðanna í messunum, at skil kemur ikki á alt svansið fyrr enn sjómenn hava tikið ræðið.

Halt tú bara fram á somu kós, Torbjørn.

Vinarliga,

Martin J. Strøm, Vágur

Matmøðrafelag fegnast

Í umrøðuni av løgmansrøðuni legði nýggi landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentanarmálum, Torbjørn Jacobsen, fram ætlanir um at leggja Almanna- og Heilsuskúlan í Suðuroynni.

Vágs Matmøðrafelag fegnast um hetta stig, tí um nøkur meining er aftan fyri tosið um bygdamenning, má nakað ítøkiligt gerast, og er tað í so seint Suðuroynni viðvíkjandi.

Arbeiðsloysið er sera stórt og miðnámsskúlin undantikin, so eru eingir útbúgvingarmøguleikar í oynni, og mestsum ómøguligt er at fáa lærupláss her. Sum er, er stórur streymur av fólki, sum flytur av oynni, meðan einki verður gjørt frá almennari síðu fyri at fáa fólk at verða verandi.

Ætlanirnar hjá Torbjørn Jacobsen, landsstýrismanni, eru eitt stig rætta vegin, men hava verið møttar av nógvum púra ógrundaðum mótmælum.

Vit vilja her vísa á, at vit síggja als onga forðing fyri at henda útbúgving kann leggjast her.

Í Suðuroynni er nógv lættari at finna sær eini bústað, enn í miðstaðarøkinum, og á Tvøroyri eru bæði barnagarður og kommunal dagrøktarskipan, sum gera barnaansingarmøguleikarnar rættuliga góðar. Har er eisini stórt bókasavn, sum í fleiri ár var rikið av einum av undangongumonnum landsins innan bókmentir.

Eisini hevur verið fört fram, at í Havn eru læraraskreftirnar frammanundan, men hetta er ein nýggj útbúgving og nýggj størv, ið skulu setast. Formaðurin í Sjúkrasystrafelagnum setir spurnartekin við fakliga førleikan á Tvøroyri. Hetta má standa fyri hennara rokning, men sigast má at um nakað sum helst hald er í hesum, er tað rættuliga skelkandi hjá okkum suðuroyingum, og átti at verið bøtt um í stundini, heldur enn bert at brúka tað sum eitt mótargument fyri eini menning í Suðuroynni.

Heldur ikki er tað ein forðing, at stjórin á skúlanum arbeiðir í Havn. Tað er jú eisini galdandi fyri Miðnámsskúlan, sum hóast tað er væl rikin.

Samanumtikið má sigast, at umstøðurnar fyri at leggja nýggja Almanna- og Heilsuskúlan í Suðuroynni eru eins góðir, og í ávísum førum betri enn í miðstaðarøkinum, og heita vit tí á allar góðar kreftir um at standa saman, nú endiliga røkist fyri at útjaðarapolitikkur sæst í verki.

Vágs Matmøðrafelag

Eykajáttan til bjálvingarstuðul

Húsalánsgrunnurin hevur í løtuni uml. 110 umsóknir, ið hann ikki fær viðgjørt orsakað av tørvandi játtan, og hevur Kristian Magnussen tí lagt uppskot fram um eykajáttan fyri august

Ólavur í Beiti

Eykajáttanarløgtingslóg fyri august 2000 hevur Kristian Magnussen, løgtingsmaður, lagt fram vegna Javnaðarflokkin, tí hann metir tørvin verða stóran á at fáa meiri játtan til Húsalánsgrunnin, so hann fær nóg mikið til m.a. bjálvingarstuðulin.

Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur Kritstin Magnussen, at á fíggjarlógini fyri ár 2000 eru 0,5 mió. kr. avsettar til bjálvingarstuðul. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina sigur landsstýrið, at »játtanin er lækkað tí tørvurin at fáa stuðul til bjálving ikki er tann sami, sum tá skipanin varð sett í gongd«.

– Hetta hevur tó víst seg ikki at verða rætt, og liggur Húsalánsgrunnurin tí í løtuni inni við uml. 110 umsóknum, ið hann ikki fær viðgjørt orsakað av tørvandi játtan. Harumframt metir Húsalánsgrunnurin, at tað fara at koma uml. 40 – 50 umsóknir afturat í ár, vísur Kristian Magnussen á.

Løgtingið bjálvast

Og víðari sigur Kristian Magnussen, at miðaljáttanirnar til bjálvingarstuðulslán liggja um 60 – 80 túsund kr., og skulu sostatt einar 10 mió. til, fyri at Húsalánsgrunnurin hevur slætt borð.

– Nú Løgtingið verður bjálvað av nýggjum, tykist tað løgið, at samgongan ikki raðfestir bjálvingina av húsum hjá pensjónistum. Ein eykajáttan hevði gjørt trivnaðin og møguleikarnar hjá pensjónistum at búð í egnum húsum betri, og samstundis hevði játtanin verið eitt ískast til handverksvinnuna runt um í landinum.

Og mælir Kristian Magnussen til, at 9,5 mió. kr. verða veittar í eykajáttan til bjálvingarstuðul.

Ein seinkað heilsan til Torbjørn Jacobsen

Sterkar eru Noregs strendur,
tær teg hóttu við at leggja saman hendur.

Men broytt er kós, eitt betri mál,
tú hevur gjørt eitt rimmar hál.

Teinur stuttur er av Langanesi,
til at stýra skútu frá Tinganesi.

Ofta føldi tú teg hentan,
nú liva skalt av skúla og mentan.

Í øllum hesum nógva heldi,
endar alt í fullveldi.

Viðv. tjóðveldiskvøðu,

Dia Ellindsson, Runavík